

## Steingja Gríms Kambansgøtu

Sum eina roynd hevur tekniska nevnd í samráð við grannarnar gjørt av at steingja Gríms Kambansgøtu summarmánaðirnar frá viku 23 til og við viku 35. Tað eru nakrira av grannunum til eitt nú økið í Vágsbotni við standmyndina av Nólsoyar Páll, Miðlahúsið, Hotel Tórshavn og partvís Karlsborg, sum hava gingið á odda í at fáa økið betri útnyttað. Eitt av hugskotunum hevur verið at steingja Gríms Kambansgøtu fyri gjøgnumkoyrandi ferðslu, og eftir at býráðið hevur havt hugskotið til hoyringar hjá grannunum við positivum úrsliti, er gjørt av at steingja gøtuna eitt tíðarskeið um summarið. Enn eru kortini ikki komin nøkur skelti upp ella aðrar forðingar, sum benda á, at gøtan er stongd fyri gjøgnumkoyrandi ferðslu. Ætlanin er tó ikki at forða fólki, sum búgva í sjálvari gøtuni, at sleppa til hús við bili. Heldur ikki verður handlum í gøtuni noktað at koyra vørur til og frá. Men ætlanin er at steingja gøtuna frá Miðlahúsinum yvir til Smiðjuna í Lítluvík hetta nevnda tíðarskeiðið frá viku 23 til og við viku 35. Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd, sigur, at roynist hendan royndartíðin væl, verður Gríms Kambansgøta kanska stongd alt árið fyri gjøgnumkoyrandi ferðslu. - Vit hava framman undan nokta parkering í Vágsbotni út til Karlsborg um sumrarnar, sigur Marin Katrina Frýdal við Sosialin.

# Kaffivognurin hitast við jarðhita

**Ein kollveltandi nýggjur og grønur háttur at hita hús er nú komin til landið. Tað er Petur Egholm, sum saman við Jarðfeingi fer at gera royndir við jarðhita**

VARANDI ORKA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Royndarholið við Kaffivognin er hitt fyrsta av fimm ella seks holum, sum skulu borast í hesum umfari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Tað man vera hálvtannað ár síðani eg byrjaði at kanna møguleikarnar fyri jarðhita í Føroyum, men hóast eg havi havt eitt sera gott samskifti við Jarðfeingi, so hevur stovnurin stutt sagt ikki fingið neyðugu pengarnar at gera royndirnar fyri, sigur Petur Egholm.

Mánamorgunin kom ein borivognur í land av Norrönu úr Svøríki, og farið varð beinanvegin undir at bora fyrsta royndarholið beint uttan fyri nýggja Kaffivognin á keiini.

- Borast skulu fimm ella seks royndarhol, og hetta verður gjørt í samstarvi við Jarðfeingi. Og av tí at Jarðfeingi ongar pengar hevur tøkar til royndirnar, verða tað tey, sum skulu brúka holini, ið rinda fyri borikostnaðin, sigur Petur Egholm.

Fyrsta holið er sum nevnt uttan fyri Kaffivognin á keiini, og harumframt skulu hol borðast hjá tannlæknunum á Óðinshædd, eitt uppi á Jarðfeingi, eitt í Suðuroy og eitt í Sandavági. Eitt sætta hol kann koma upp á tal, um áhugi er fyri tí í Klaksvík.

Hetta er ein alsamt vaksandi háttur at hita húsini, og í Svøríki verða borað áleið 30.000 slík hol til jarðhita um árið.

### Stórir møguleikar

Sum nevnt er hetta enn á royndarstigi í Føroyum, og tí verða kanningar gjørdar fyri hvørjar seks mertar, ið borað verður. Royndir verða tiknar bæði av grótlagi og vatni, og mánadagin kemur ein flokkur frá tekniska skúlanum í Lund til Føroya at gera mátingar av holunum, sum tá eru borað.

Boringin verður gjørd fyri svenskar prísir, og tað merkir umleið 200 krónur fyri meturin. Holið við Kaffivognin er 150 metrar djúpt, og tá funnið er fram til, hvussu nógvur hiti fæst pr. metur, ber eisini til at siga, hvussu djúpt borast skal í mun til støddina á húsunum.

Reint tekniskt virkar skipanin so, at ein slanga verður koyrd niður á botn, og síðani pumpar ein hitapumpa eina blanding av vatni og spritti runt í einari afturlætnari skipan. Tá blandingin fer inn í pumpuna hevur hon vanligan hita. Inni í pumpuni verður blandingin køld niður á null gradir, blandingin verður pumpað niður í jørðina og kemur upp aftur við til dømis átta hitastigum. Gjøgnum torskildar skipanir verður hitamunurin útnyttaður, og sambært Petur Egholm verða húsini hitað nógv meiri enn tann lutfalsliga lítla hitamunin, sum blandingin í slanguni gevur.

Hendan skipanin er munandi haldbærari enn vanligu hitapumpirnar til luft, og geva royndirnar væntaða úrslitið, eru stórir møguleikar í varandi grønari orku til ein rímiliga bíligan penga.




*Tað er Petur Egholm, sum hevur tikið stig til royndarboringarnar, sum verða gjørdar í samstarvi við Jarðfangi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*